ÍTRÓTTUR

**FÓTBÓLTUR** effo deildin

DYSTURIN HESA VIKUNA

***UNGUR HB-BONKUR*** *Vegna nógvu skaðarnar hevði HB sera ungar leikarar á bonkinum ímóti EB/Streymi. Thomas Knudsen og Pál M. Joensen eru gaman í báðir 21 ára gamlir, men Bartal Wardum er 17 ára gamal og Teit Jacobsen og Adrian Justinussen einans 16 ára gamlir.*

1 til 6

**SPÆLARAMETING**

EB/Streymur

**3 René Tórgarð** Átti ongan lut í HB-málunum og hevði eina stórbjarging í seinna hálvleiki.

**4 Jónas Tór Næs** Álopskendur og fekk nakrar málmøguleikar. Hansara lutur í fremra partinum av spælinum skapti yvirtalið í seinna hálvleiki. Millum teir raskastu.

**2 Gert Hansen** Manglaði avgerandi takklingina við 2-0-málið og hevði trupulleikar við at rudda nakrar bóltar burtur.

**2 Høgni Madsen** Yvirspældur í 1-0-málinum og varð seinni fluttur úr miðverjuni. Riggaði betur á miðvøllinum.

**3 Jóhannus Hansen** Bakkarnir hjá EB/Streymi gjørdu sína skyldu, og Jóhannus átti onga skuld í málunum.

**4 Gunnar Zachariassen** Ein av teimum mest eyðsýndu hjá EB/Streymi við góðum driblingum og skilti seg væl av við bóltin. Troyttaðist og varð útskiftur.

**3 Marni Djurhuus** Fekk tamarhald á miðverjuni, tá ið hann varð fluttur hagar.

**3 Rógvi E. Nielsen** Rann nógv og royndi seg við langskotum. Hann royndi, má sigast.

**4 Hans Pauli Samuelsen** Átti ein fót í so at siga øllum tí skapandi hjá EB/Streymi. Lívligur og sjónligur – umráðandi leikari.

**2 Niels Pauli B. Danielsen** Royndi at venda spælinum, men í trýstinum í seinna hálvleiki var hann ikki millum teir eyðsýndu. Nakrar skeivar sendingar.

**3 Arnbjørn Hansen** Breiddi seg út í málteiginum og fekk hendinga málmøguleikar. Manglaði tað síðsta í royndunum.



# HB HONGUR Í VIÐ SANNFØRANDI SIGRI

**Hóast liðini í spælbýti og málmøguleikum vóru rættiliga jøvn, so var avrikið sum eftir bókini hjá HB, sum við rimmar 3-0-sigri í Streymnesi ikki letur B36 renna enn longri frá sær í kappingini um FM-heitið. Kaldliga avgreiddir møguleikar sendi HB á odda 2-0, og tá ið EB/Streymur so einki fekk burturúr trýstinum, teir skaptu sær – ja, so revsaði HB teir og vann 3-0.**

EB/Streymur (0-2) **0-3** Havnar Bóltfelag 1904

**Pætur Albinus - Margáir**

0-1: Poul Ingason, 10.
0-2: Andrew av Fløtum, 29.
0-3: Kristin R. Mouritsen, 92
.Dómari: Dagfinn Forná




Tað var, eins og í restini av landinum, fitt av vindi við Margáir sunnudagin, har EB/Streymur fekk vitjan av HB í einum ógvuliga týdningarmiklum dysti fyri bæði liðini – HB, sum framvegis roynir at elta B36 og EB/Streym, sum stríðist fyri at halda fast í kappingini um tey evropeisku plássini.

Bæði liðini manglaðu fólk til dystin. EB/Streymur var uttan roynda verjuskansan, Egil á Bø, sum var leikbannaður, meðan HB – sum framvegis var uttan teir langtíðarskaddu – eisini mátti síggja burt frá Jóan Símuni Edmundssyni, sum var skaddur.

Í mun til aðrar dystir, so slapp vøllurin við Margáir undan tí heilt nógva vindinum, og líkindini máttu sigast at vera í lagi. Og tá ið somikið nógv var upp á spæl, var valla nakar ivi um, at dysturin skuldi gerast lívligur.

## HB dreymabyrjan

Tá ið EB/Streymur fyri tveimum vikum síðani møtti oddaliðnum B36, kastaði tað ein 1-0-sigur av sær við skilagóðum verjukendum taktikki, men tað var ikki líkt til, at sami taktikkur varð tikin í brúk ímóti HB. EB/Streymur, sum hevði undanvind í fyrra hálvleiki, var langt frammi á vøllinum frá byrjan. Tað vóru eisini heimamenninir, sum fingu fyrstu skotroyndina, men tað var HB, sum longu eftir tíggju minuttum skapti sær eina dreymabyrjan.

Andrew av Fløtum fekk bóltin stutt uttanfyri brotsteigin, haðani hann sendi eitt frálíkt innlegg til Poul Ingason, sum við einum ristsparki legði HB á odda 1-0.

Jónas Tór Næs fekk stutt eftir góðan møguleika, men hóast hann var næstan púra leysur og ávegis í feltið, so mátti hann staðfesta, at vinstra bein ikki er eins gott sum høgra.

## Aftur HB

Í spælbýti og málmøguleikum var EB/Streymur ikki langt frá HB, og sum heild var fyrri hálvleikur rættiliga javnur. HB hevði bóltin meiri og royndi at mynstra seg ígjøgnum, meðan EB/Streymur var nógv meiri beinleiðis og setti ferð á ímóti málinum. Í nógva viðvindinum var tað tó ikki lætt at fáa bóltin inn um HB-verjuna, men heimaliðið royndi seg við langskotum, innleggum og deyðbóltsstøðum, sum tó ikki vóru nóg mikið at finna vegin til málið.

At finna vegin til málið dugdi HB betur. Tað vísti teir aftur tá ið góður hálvur tími var leiktur. Alex José dos Santos og Andrew av Fløtum, sum vóru millum mest eyðsýndu leikararnar í fyrra hálvleiki, spældu seg væl frameftir í brotsteigin, har Andrew av Fløtum kom í góða støðu og langaði bóltin í mál til 2-0. Enn ein støða, har verjan hjá EB/Streymi ikki var nóg avgjørd, og løtu seinni kom broytingin: Høgni Madsen var fluttur fram á miðvøllin, meðan Marni Djurhuus varð fluttur aftur í miðverjuna at binda meiri um.

Løtuna til hálvleiks hevði EB/Streymur onkrar hálvar málmøguleikar, eitt nú langskot frá Rógva E. Nielsen og stútara frá Arnbirni Hansen, men neyvleikin var ikki til staðar og HB slapp til hálvleiks á odda 2-0.

## Heimaliðið royndi

EB/Streymur byrjaði sum eitt fok í seinna hálvleiki. Fyrsta ávaringarskotið átti Jónas Tór Næs, sum við einum dundurskoti bara var eina stórbjarging frá Teiti M. Gestsson frá at minka um munin alt fyri eitt. Hetta var bara byrjanin upp á eina sera góða løtu hjá EB/Streymi, sum við væl skipaðum og ágrýtnum álopsspæli megnaði at leggja trýst á HB. Gert Hansen við stútara og Hans Pauli Samuelsen við skoti vóru eisini tætt við at minka um munin.

Hóast EB/Streymur hevði bróðurpartin av spælinum og størstu málmøguleikarnar, so gav tað eisini HB møguleikar í mótálopunum. Eitt nú royndi Alex José dos Santos seg við einum dundurskoti, men René Tórgarð stórbjargaði bóltinum frá at sita í málhorninum.

## Sigurin staðfestur

EB/Streymur helt fram við at leggja nógv fyri í álopspartinum, og tað var eisini um reppið fleiri ferðir eftir

**FJEPPARA SMS**

***Allan Enghamar***
HB-FJEPPARI
*Klassamunur! Nú halda vit bara kósina dreingir! HåååBeee!*